# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Gudmund Bjarnason, ættaður av Tvøroyri, búsetandi í Holbæk í Danmark, andaðist 23. mars 85 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Harry Petersen Sørvági**, fer av Landssjúkrahúskapellinum mánadagin klokkan 16.00. Jarðarferðin verdur úr Kedron í Sørvági týsdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Harry kunnu lata eina peningagávu til AKURIN, konta í peningastovnunum.

**Kertin Høgnesen, Leirvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum 24. mars 86 ára gomul. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 27. mars klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju mikudagin klokkan 13.30. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey sum vilja minnast Kertin kunnu lata eina gávu til Leirvíkar krikju.

Kistan við **Jovinu Jónsson, Argir**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju týsdagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Jovinu kunnu lata eina gávu til Argja kirkju.

# Kommunur í Suðuroy samstarva um sosialmál



*Hósdagin skrivaðu uboð fyri tær fýra kommunurnar í Suðuroy undir avtaluna um eina felags sosiala deild. Frá vinstru eru tað Elin Nielsen, borgarstjóri í Fámjin, Amy Mech, skrivari í Sumbiar Kommunu, Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri og Levi Niclasen, borgarstjóri í Hvalba*

**Fýra kommunur í Suðuroy hava nú tikið seg saman um eina felags sosiala deild**

Nú er greitt, at tað eydnaðist ikki at øllum sjey kommununum í Suðuroy at semjast um at skipa eina felags sosiala deild fyri alla oynna.

Ikki fyribils í hvussu so er.

Allar kommunurnar í Suðuroy hava annars avtalu um eina felags barnavernd og í kjalarvørrinum á tí var ætlanin eisini at stovna eina felags sosiala deild fyri alla oynna.

Men tað hevur gingið strilti og nakað síðani frættist, at vágbingar og porkenningar arbeiddu við eini ætlan um at gera eina sosiala deild fyri tær báðar kommunurnar.

Og skrivaðu so Hvalba, Tvøroyri, Fámjin og Sumba undir eina avtalu um at skipa eina felags sosiala deild fyri tær fýra kommunurnar.

Sostatt er greitt, at Sumbiar Kommuna, sum er syðsta kommuna í landinum, gleivar tvørturum bæði Vág, Porkeri og Hov og fer í samstarv við tær tríggjar kommunurnar í norðaru helvt um eina Sosiala deild.

Samstundis er óvist, hvar Hovs Kommuna stendur í hesum máli.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at avtalan fevnir um nógva ymsar tænastur á sosiala økinum, eitt nú bæði barnaansing, børn við serligum tørvi, fríplass í barnagarði, ungdómshús, eldratilhald, lektiukafé og annað mangt.

Tó er Sumba ikki við í samstarvinum um eldratilhald.

Tað merkir eisini, at tær fýra kommunurnar í samstarvinum hava eisini javnbjóðis rættindi, tá ið størv skulu setast á dagstovnum og øðrum kommunalum, sosialum stovnum í samstarvsøkinum.

Tað merkir eisini, at børn úr Sumba hava rætt til at fara í barnagarð á Tvøroyri.

Kristin Michelsen heldur, at tá ið tunnilin er komin, er ongin teinur at ferðast.

Hann heldur, at hetta er eitt stórt framstig, hóast tað ikki eydnaðist at fáa alla oynna at semja um eina slíka tænastu.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða mamma, vermamma og omma

**Jovina Jónsson**

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 22. mars, 78 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Argja kirkju týsdagin 27. mars kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Sunrid og Sigurdjón við familju**

*Tey, ið vilja minnast Jovinu, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Argja kirkju.*

---

**Dagurin**
**27. mars. Kastor.** Tær gomlu søgurnar nevna fleiri annars ónevd halgimenni, sum itu Kastor og vórðu tikin av døgum 27. og 28. mars.

---

†

**Kertin Høgnesen**
Leirvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum 24. mars, 86 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum týsdagin 27. mars kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju mikudagin 28. mars kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Myrna og Konny**

*Tey, ið vilja minnast Kertin, kunnu lata eina gávu til Leirvíkar kirkju.*

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á einhvønn hátt vístu okkum samkenslu, tá ið kæra kona mín, dóttir, systir, svigarinna, mostir og fastir

**Esta Vilhelm**
ættað úr Klaksvík, búsitandi í Nørre Snede

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*
**Jørn Christiansen, Asta, Atli og Jensa**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu og umsorgan, tá kæri maður mín og pápi okkara

**Karsten Klit**
Lystrup

so brádliga og óvæntað doyði.
Túsund takk fyri, at tit hava verið so umhugsin, takk fyri blómur, kransar, heilsanir, gávur og praktiska hjálp í allar mátar.

*Blíðar heilsur*
**Annika og børnini**